# FCK tvær ferðir í sjónvarpinum

**Í dag fer FCK at vera við til at seta sjøtul á nýggja kappingarárið, og týskvøldið skulu teir spæla í Slovenia**

ÚTISETA FELAG
*Jóannes Hansen*

Í dag verður farið undir eitt nýtt kappingarár í superliguni. Setningurin hjá FCK og Toda Jónsson verður at verja fremsta plássið bæði í steypakappingini og landskappingini. Fyrsta takið á tí leiðina skulu teir taka longu seinnapartin í dag. Tá fer FCK at spæla í Silkeborg. Heimaliðið hevur verið eitt ár í næstbestu deildini og vent.

Todi skal við FCK til Silkeborg. Um hann verður millum teir fyrstu ellivu er meiri ivasamt. Á heimasíðu síni skrivaði hann eftir Super Cup uppgerðina ímóti AaB týskvøldið, at eingin av teimum, sum vóru millum teir fyrstu ellivu ta ferðina, hevði spælt seg av. Sum vit søgdu fyrr í vikuni, so hevur FCK venjarin nevnt, at hann ætlar at skifta meiri út, og harvið at geva fleiri møguleikan millum teir fyrstu ellivu, enn hann gjørdi í fjør.

Um Todi kemur á vøllin í Silkeborg seinnapartin í dag, so verður talan um jubileum. Talan verður um dyst nummar tvey hundrað fyri FCK hjá honum. Todi hevur verið í FCK síðani á sumri í 1997.

Í sær sjálvum er tað stórur biti hjá FCK at skula verja gullið í steypakappingini og landskappingini. Men tað, sum liggur fremst í huganum hjá FCK leiðsluni og spælarunum, er, at standa seg betri í europeisku meistarakappingini, enn tað higartil hevur eydnast. Tað vil við øðrum orðum siga, at FCK ætlar sær upp í part í bólkaspælinum í meistarakappingini.

Fyrsta stigið á tí leiðini verður tikið nú týskvøldið. Tá skal FCK spæla í Slovenia ímóti NK Gorica á útivølli. Fyrr í vikuni ljóðaði, at dysturin skuldi spælast Ólavsøkuaftan, men nú er tað greitt, at hann verður týskvøldið 27. juli kl. 19.15.

Dysturin seinnapartin í dag ímóti Silkeborg verður vístur á TV3+ rásini. Dysturin á Nova Goricas stadion í Slovenia týskvøldið fer tað at bera til at síggja á TV5 ella tí, sum fyrr nevndist TV Danmark.




*FCK verður næstu tveir dagarnar tvær ferðir at síggja í sjónvarpinum*

# Serbi royndarvenur í ÍA

**Í morgin fer ÍA við Juliani Johnsson á liðnum at taka ímóti botnliðnum Fram, sum hevur tveir føroyingar á sínum liði**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Akranes hevur ikki nóg nógvar álopsspælarar. Tað hevur ljóðað síðstu vikurnar. Fyrr í vikuni ljóðaði í íslendsku fjølmiðlunum, at felagið hjá Juliani Johnsson leitaði niðri á Balkan eftir møguligum styrki til álopið, og nú hava teir funnið ein mann, sum kanska verður tann, sum skal skjóta ÍA heilt fram í toppin.



*Hans Fróði Hansen sum er annar av føroyingunum í Fram Reykjavík*

At kanska verður skotið inn ímillum kemst av, at tað ikki enn er víst, at hesin Dragan Simovic er rætti maðurin. 27 ára gamli serbin er á Akranesi og royndarvenur. ÍA hevur fyri stuttum mist tveir álopspælarar. Teir siga seg bara hava ein skikkaðan álopsspælara, og nú vóna teir, at hesin serbin skal økja um úrvalið í fremstu røð.

Í annaðkvøld verður føroysk uppgerð á Akranesi. Julian Johnsson og liðfelagarnir hjá honum í ÍA fáa vitjan av Fram og Fróða Benjaminsen og Hans Fróða Hansen.

Setningurin hjá ÍA er at fáa fulla úrtøku og harvið styrkja um sína støðu í oddastríðnum. Teir í Fram vera ivaleyst nøgdir, um teir fáa eitt stig í viðførið, tá ið teir fara aftur undir Hvalfjørðin.

Julian Johnsson er fastur maður á miðvøllinum hjá ÍA. Føroyingarnir í Fram hava higartil verið millum teir fyrstu ellivu. Undantakið var, tá ið Fram í síðsta umfarinum tapti 2-1 á heimavølli ímóti ÍBV. Tá var Hans Fróði Hansen ikki á liðnum, og Fróði Benjaminsen varð skiftur út miðskeiðis í 2. hálvleiki.

Fram hevur nýliga skift venjara, og í morgin fæst at síggja, hvussu stóran leiklut nýggi maðurin ætlar, at føroysku spælararnir skulu eiga, nú Fram fer at stríðast fyri at sleppa so mikið uppeftir støðutalvuni, at teir eisini næsta ár kunnu spæla í bestu deildini.

Vikuskifti
Nr. 140 • leygardagur • 24. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Í Gøtu ein dag ella báðar tveir

Niels Uni Dam hugleiðir

síða 2–3



# Altjóða plátufelag til Føroya at lurta eftir Týr

**Plátufelagið Roadrunner Records er áhuga í at gera ein sáttmála við føroyska rockbólkinum Týr, og í august mánaði kemur stjórin fyri týsku deildina hjá felagnum til Klaksvíkar at lurta eftir Týr á palli**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

– Hetta er nógv tað størsta, sum vit hava verið í nánd av.

Tað sigur gittarspælarin og sangarin í rockbólkinum Týr um sambandið, sum bólkurin hevur fingið við týsku deildina hjá altjóða plátufelagnum Roadrunner Records.

Her er ikki talan um kurteisligan áhuga í forbífartinum, men um ein so veruligan áhuga, at týski stjórin í felagnum kemur til Føroya at uppliva Týr á konsert.

Týr er ein av bólkunum, sum skal spæla á Summar Festivalinum í Klaksvík miðskeiðis í august mánaði, og tá koma tvey umborð fyri plátufelagið til Klaksvíkar at lurta.

– Vit hava havt samband við teir í eina tíð, og tað var millum annað tí, at vit vóru í Týsklandi og spældu herfyri. Nú vilja teir gjarna uppliva okkum einaferð afturat, og teir koma til Føroya at gera tað, sigur Heri Joensen.

## Ein fløga endaði hjá plátufelagnum

Roadrunner Records gevur harðan rocktónleik út, og teir hava kend nøvn sum Slipknot, Nickelback og Machine Head í sínari legu. Felagið hevur deildir í USA, Japan, Australia, Spania, Italia og øðrum europeiskum londum, so talan er veruliga um eitt altjóða plátufelag.

– Tá ið vit sendu okkara fløgur til ummælarar, útvarpsstøðir og onnur, endaði ein av fløgunum hjá hesum plátufelagnum, tí ein umboðsmaður fyri felagið hoyrdi fløguna og helt, at tað var nakað fyri teir, greiðir Heri Joensen frá.

Síðani hevur samband verið millum Týr og Roadrunner, og nú er tað sambandið blivið so gott, at tosað hevur verið um ein møguligan sáttmála millum partarnar.

– Vit vóna, at tað fer at eydnast okkum at fáa ein sáttmála, og so kann tað blíva eitt stórt gjøgnumbrot fyri okkum, sigur Heri Joensen.




*Kári Streymoy og hinir í Týr hava nú ein týskan plátufelagsstjóra í hølunum á sær. Teir vóna, at tað kann hava við sær ein plátusáttmála um útgávu í fleiri londum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Heilt serligur tónleikur

Týr hevur seinnu árini verið ein tann virknasti føroyski tónleikabólkurin í útlandinum, og málið hjá teimum hevur allatíðina verið, at teir skuldu gerast yrkistónleikarar.

Týr er kent í Íslandi, og teir hava eisini spælt í Russlandi, Týsklandi, Noregi og í fleiri øðrum londum.

Teir hava verið treiskir og hava ikki givið upp. Onkrar útskiftingar hava verið í bólkinum, men kjarnin í Týr hevur hildið áfram.

Áhaldandi arbeiðið og stóri hugurin at spæla er nú við at bera frukt, og tað kemst fyrst og fremst av, at Týr hevur funnið sín samleika sum rockbólkur. Samanblandingin av klassiskum rocktónleiki á la Black Sabbath og teir sermerktu norrønu tónarnir og føroysku kvæðini hava gjørt Týr til nakað heilt serligt.

– Tað, sum hetta plátufelagið er áhuga í, er okkara serligi tónleikur, og tað eru ikki minst kvæðini, sum gera tað. Teir siga seg ikki hava hoyrt slíkan rocktónleik áður, og tí hava teir sýnt okkum so stóran áhuga, sigur Heri Joensen.

Týr vónar nú, at áhugin hjá týska plátufelagnum verður ikki minni, eftir at teir hava upplivað Týr í Føroyum.

– Vit vóna sjálvandi, at vit fáa møguleikan at geva okkara tónleik út í so nógvum londum sum gjørligt, sigur Heri Joensen.

Og møguleikin er nú avgjørt fyri, at Ormurin Langi kann náa enn longur út í heim.

### Týr

Heri Joensen – gittar og sang.
Ótto P. Arnarson - gittar
Gunnar Thomsen – bass
Kári Streymoy – trummur

Bólkurin kom rættiliga fram í Prix Føroyum í 2001, tá ið Ormurin Langi rungaði um allar geilar. Fólk tóku sera væl ímóti bólkinum, sum eisini kom í finaluna í Prix Føroyum hetta árið. Har fingu teir kjansin at spæla á Jelling Festivalinum, og bólkurin hevði ársins hitt í føroyskum útvarpi tað árið.

Síðani hevur bólkurin gjørt nógv um seg. Hann hevur givið tvær fløgur út, hevur verið á konsertferð ymsastaðni í Norðurlondum og var millum annað eitt heitt navn í Íslandi í farna ári. Aftur í ár hava teir spælt í Íslandi.